## Dýr króna

Tey seinastu árini er nógvur málmur dýrkaður rættiliga nógv, og tað kann fáa avleiðingar á mangt og hvat. Eitt nú sigur íslendski tjóðbankin, at tað kostar honum hálva triðju krónu at gera ein mynt, sum er ein króna. Í fjør bílegði bankin 10 mió. krónumyntir frá einari verksmiðju í Bretlandi, og tað kostaði 25 mió. íslendskar krónur. Myntin hevur eitt lag av nikkel uttan á stáli, og tað er nikkel, sum er vorðið so dýrt, sigur tjóðbankin.



*Ein króna kostar hálva triðju krónur at gera*
*(Mynd: Vísir)*

## Icelandair ringt úrslit

Íslendska flogfelagið Icelandair hevði smáar 25 mió. krónur í avlopi í fjør eftir skatt, men tað var bara ein tíggjundapartur av svlopinum árið fyri. Bara í seinasta ársfjórðingi í fjør hevði felagið einar 70 mió. krónur í halli. Roknskapurin fyri 2007 vísir, at inntøkurnar vuksu 13 prosent í fjør. Björgúlfur Jóhannsson, forstjóri, segði í sínari roknskaparframløgu, at úrslitið bleiv, sum leiðslan hevði væntað, men at tað verður betur í 2008.

# reformur skal



*Íslendski forsætismálaráðharrin, Geir Haarde úr Sjálvstæðisflokkinum, ætlar at styrkja um íslendska búskapin við skatta- og sosialreformum*

væl og starvsútbúgving og endurútbúgvingarskeiðum, sum eru góðkend av Útbúgvingarmálaráðnum, verða ikki at rokna sum skattskyldug inntøka hjá viðkomandi einstaklingunum. Stjórnin fer somuleiðis at samskifta við partarnar á arbeiðsmarknaðinum viðvíkjandi samskipan av skattaviðurskiftum, í sambandi við gjaldskostnað av hesum fíggingum av fyribyrging og starvsútbúgving.

Stjórnin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru samd um fylgjandi tiltøk og átøk við serligum atliti at útbúgvingarøkinnum, við serligari tilskilan til útbúgving av fólki á arbeiðsmarknaðinum við avmarkaðari útbúgving:

- Endamálið er, at í mesta lagi 10% av fólki á arbeiðsmarknaðinum, ikki hava arbeiðs- ella miðnámsútbúgving í seinasta lagi í 2020. Ein miðvísur innsatsur verður gjørdur at skapa møguleikar og karmar fyri útbúgving av fólki á arbeiðsmarknaðinum, við avmarkaðari útbúgving. Støðið á miðnámsútbúgvingunum skal økjast til tess at gera tað lættari hjá fólki at taka eina utbúgving, sum hóskar teimum best.
- Lóg verður smíðað, sum tryggjar øllum fólki møguleikan fyri útbúgving við lokna miðnámsútbúgving, har kostnaðarliga javnvágin verður varðveitt í almenna sektorinum. Fíggjarligi stuðulin frá stjórnini á miðnámsstøði, á universitetsstøði og á starvsútbúgving verður samskipaður.
- Reglurnar fyri Studentalánsgrunnin skulu endurskoðast við tí endamáli, at varðveita javnbjóðismøguleikar millum einstaklingar og bólkar viðvíkjandi útbúgvingarmøguleikunum. Í samsvari við framman undan samtykta politikkin hjá stjónini, verða stig tikin til at tryggja, at kostnaðarstøðið á millumskúlaøkinum av innliman og undirvísingartilfari, verður hildið á lægsta støði.
- Grundarlagið undir framhaldandi útbúgving og endurútbúgving, sum kemur fólki á arbeiðsmarknaðinum tilgóða, verður økt við jøvnum stigum komandi tvey árini við 300 milliónum krónum.

Stjórnin fer at útnevna ein arbeiðsbólk við limum úr feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, sum fær ta uppgávu at finna hættir og vegir at tryggja, at arbeiðsfólk við lógligum bústaði í Íslandi, sum arbeiða fyri íslendskar fyritøkur uttanlands, kunnu varðveita teirra rættindi í íslendsku vælferðarskipanini.

Stjórnin hevur í sinni at broyta verandi tryggingarendurgjaldslóg soleiðis, at sameinda ábyrgdin fyri vanlukkum á arbeiðsplássum ikki verður at rokna sum feilur hins starvssetta, uttan so, at skaðin kann sigast at vera gjørdur við vilja, ella av stórum ósketni hins starvsetta.

Hesi tiltøk eru sum nevnt ætlað at styrkja um íslendska búskapin, og tey koma ógvuliga passandi nú, tá ágangurin móti fíggjarstøðuni uttanífrá er so nógvur.

# Endin á veitsluni fyri íslendskar bankar

**Jóhannes Albert Sævarsson, ið arbeiðir sum advokatur í Reykjavík, stúrur, eins og flestu aðrir íslendingar, fyri fíggjarligu støðuni í landinum beint nú**



*Jóannes Albert Sævarsson, ið er hálvur føroyingur, og sum arbeiðir sum advokatur í Reykjavík, er ikki serliga bjartskygdur um framtíðina, nú útlendsku fíggjarbløðini eru farin at seta spurnartekin við íslendska búskapin*

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Aðrastaðni á hesum síðum ber til at lesa grein, sum stóð í Financial Times fyrr í vikuni. Rás2 og Sosialurin hava tosað við íslendska sakføraran, Jóhannes Albert Sævarsson, sum fylgir gongdini í íslendska búskapinum gjølla

- Nú tað verður skrivað so nógv negativt um íslendsku fíggjarstøðuna í bløðunum, so eru fólk øðrkymlað og bangin fyri, at alt skal fara at ganga skeiva vegin. Tað hevur sterka kenslan verið seinastu dagarnar, í hvussu er, sigur Jóhannes Albert Sævarsson.

Men eitt er, hvat útlendsk bløð skriva, nakað annað er, hvat íslendski fíggjarmarknaðurin metir um støðuna.

- Á ein hátt skilja íslendsku bankarnir als ikki, at stóru útlendsku bløðini og stóru metingarfeløgini skriva so negativt um íslendska fíggjarmarknaðin og íslendsku bankarnar. Teir meta als ikki, at støðan er so álvarslig, sum Financial Times vil gera hana til. Sambært leiðandi fíggjarfrøðingum og íslendskum bankastjórum er einki um hetta, sum útlendsku bløðini føra fram, sigur Jóhannes Albert Sævarsson.

Men uttan mun til, um støðan er uppstaðin av metingum hjá útlendskum serfrøðingum og gjøgnum útlendsk bløð, so ávirkar hetta kortini íslendsku bankarnar soleiðis, at teir mugu rinda okursrentu, um teir yvirhøvur sleppa at upptaka lán. Og tað ávirkar kortini støðuna í Íslandi.

- Tað ávirkar sjálvandi, at lánini gerast nógv dýrari enn áður. Og bankarnir á sínari síðu hava gjørt av at steingja fyri lánsveitan. Teir hava fíggjað húsamarknaðin her yviri seinastu fýra árini, og tey útlánini hava teir stongt fyri, í hvussu er fyribils, sigur Jóhannes Albert Sævarsson.

Hetta merkir sambært íslendska advokatinum, at íbúðarmarknaðurin fellur, um enn hann ikki hevur styrtkava enn, sum man annars kundi roknað við.

### Fólk stúra

Jóhannes Albert Sævarsson sigur, at tað finst ein stovnur í Íslandi, álíkur Húsalánsgrunninum, og tað er einasti møguleiki hjá fólki at upptaka lán í løtuni.

- Marknaðurin er næstan steðgaður heilt upp seinastu tvær vikurnar, sigur Jóhannes Albert Sævarsson.

Hetta ávirkar sjálvandi gerandisdegin hjá íslendingum.

- Tað er greitt, at ungfólk hugsa seg meiri enn einaferð um, áðrenn tey fara út at upptaka dýr lán. Húsaprísirnir eru framvegis høgir og lánini ovurdýr, so tað er ein sera stórur munu á nú, og so fyri einum ári síðani, sigur Jóhannes Albert Sævarsson.

Hartil koma nógvar aðrar óvissur í íslendska samfelagnum, og íslendski advokaturin vísir serliga á fiskivinnuna, har skipini so seint sum í gjár mistu lodnuna burtur, samstundis sum einki stendur til við toskakvotunum.

- So tað er klárt at fólk hugsa seg væl um og ganga stillisliga við hurðunum, sigur Jóhannes Albert Sævarsson.

Og støðan fær íslendingar at stúra.

- Eg vænti, at fólk spakuliga fara at merkja, at góðu tíðirnar eru at enda komnar, og at vit nú fara at ganga verri tíðum ímóti, sigur Jóannes Albert Sævarsson við Rás2.